

*Aktuella orrustan millum teir báðar høvuðspersónarnar í filminum, Jóannes Eidesgaard og Høgna Hoydal, var gloymd eina løtu í gjárkvøldið í Norðurlandahúsinum*

# Retorikkurin vann – innihaldið tapti

**Framúr góði filmurin “Fimm dagar fyri valdið” avdúkar tveir politikarar, sum hava lært seg retorikk, meðan tað er so sum so við politiska innihaldinum**

UMMÆLI
*Birgir Kruse*

Í bleiktrandi sjónvarpsljósi og jøvnum tíðindastreymi kann politikkur tykjast spennandi og vælskipaður við góðum spunasmiðum og hollum ráðgevum. Allir av evstu rók í samfelagnum.

Veruleikin er ein annar. Politikkur er eitt einsamt strev, ið kostar nógva tíð og stórt persónligt offur. Tað prógvar nýggi heimildarfilmurin við sniðfundiga heitinum “Fimm dagar fyri valdið”.

Tí hetta er ein filmur um tveir menn, Jóannes Eidesgaard og Høgna Hoydal, ið vilja vald, kosta hvat tað kosta vil. Hvør dagur er ein bardagi fyri valdi. Sum flugan á vegginum fylgja vit teimum í fimm teir mest avgerandi dagarnar fyri løgtingsvalið í januar. Og hesar fimm dagarnar falla nógvar grímur.

Millum annað at besti sparringspartnari hjá Jóannesi er konan Anita, og at Høgni kennir seg best heima í egna fílabeinstorninum, sum hann tekur til. Vit eygleiða eisini ein bannandi, men skemtingarsaman Jóannes, meðan Høgni er framúr siðiligur, næstan turrisligur. Men so roykir hann so illa.

Upptøkutólini eru sum flugan á vegginum og tey, ið spyrja, hoyrast bara hendingaferð. Teir eru Dánjal Højgaard og Tórður Mikkelsen. Uppskriftin er hin góða gamla hjá Niels Juel Arge at klippa seg úr samrøðuni og gera seg ósjónligan. Einfalt og effektivt.

Tað er Dánjal Højgaard, ið eigur hugskotið handan filmin. Hann prógvaði eisini sítt nærverandi dugnasemi við filminum “Svartur Sannleiki” (1999) um Ingálv av Reyni. Nærvera er lyklaorðið í øllum hansara arbeiði.

Dag fyri dag verður nýggja søgan um teir fimm valdsdagarnar søgd paralell, javnfjart, við báðum høvuðspersóninum í miðdeplinum.

Krossklippingin riggar væl og er ofta beinleiðis effektiv fyri søguna. At gera politikk til undirhald er ikki lætt. Ja, kanska er politisk orrusta tað truplasta og keðiligasta evnið at syfta, tá umræður undirhald. Men tað hepnast framúr.

Stórsta styrkin er góði tekst-urin, ið knýtir drúgvu og hendingaríku søguna saman, og so turri upplesturin hjá Pálli Danielsen. Upplesturin er somikið góður, at tú gloymir, at hann er har. Tað er styrkin við góðum upplestri. Ikki at taka frá, ella leggja afturat, men bara at bera søguna fram. Einki annað. Tá fær filmaða søgan eitt “flow”, tey rópa. Og “flow” hevur søgan um teir fimm dagarnar, ið filmaði valdsdysturin hjá Høgna og Jóannesi varir.

Verri er statt við politiska landslagnum í landinum. Mangan verður tosað um spunasmíð, revakøkur og rossahandlar á hægsta stigi. Hesin filmur avdúkar, hvussu syndarliga illa politiska apparatið hjá flokkunum riggar. Tað er ikki bara innihaldsleyst, tað er beint fram høpisleyst.

Besta brotið at prógva hetta er fyrst ein bussfundur hjá Javnaðarflokkinum á Kambsdali og so ein busstúrur hjá Tjóðveldi í Sandoynni, har tveir lokalir høvuðkambar fara upp at kóla, meðan vit øll fylgja við. Óbetaliligt. Og so ein taktisk samrøða millum Jóannes og Kristian Magnussen. Óbetaliligt.

Í skemtiligu deildini er besta brotið, tá Hendrik Old skriðar sær í rygginum upp móti durakarminum á Apotekinum. Óbetaliligt.

Og so mátti tað koma. Klippið frá valfundinum í Miðlahúsinum, tá Jóannes nevnir kúbeinið úr amboðskassanum hjá Høgna. Tá flenti allur salurin, eisini báðir høvuðspersónarnir. Ein praktfull biografupplivíng.

Skilligt er at politikararnir, ið allir eru menn, hava lært seg hugtakið retorikk. Teir skriva og finna uppá tey fagrastu orðini. Bara Anita, kona Jóannes, talar at. Við hesum filminum kunnu vit siga at retorikkurin vann, men innihaldið tapti.

Eitt sindur óvanligt, at ein sjónvarpsfilmur, sum Kringvarpið hevur gjørt, verður sýndur, sum var tað ein biograffilmur. Men undirtøkan var stór, og politiska støðan gav filminum nýggjar, óvæntaðar dygdir. Serliga tí at høvuðspersónarnir, Jóannes Eidesgaard og Høgni Hoydal, sótu á fremsta beinki í Norðurlandahúsinum.

Hetta er styrkin við biografsýningum – menniskjansliga samveran, at hitta fólk, skifta orð um brot og vendingar í filminum og so at flenna í felag, tá okkurt stuttligt verður sagt.

Við at sýna filmin á henda hátt, fingu vit eina kærkomna biografupplivíng. Í somáta eru Føroyar kargar. Sera kargar. Filmar eiga at síggjast í biografi. Eisini eygleiðandi heimildarfilmar sum “Fimm dagar fyri valdið”.

fyri valdið” er at geva áskoðaranum eina aðra mynd av hesum báðum politikararnum, enn hana, vit vanliga síggja. Um hetta skal eydnast, treytar tað sjálvandi, at áskoðarin gongur við eini kenslu av, at okkurt (nógv?) er fjalt fyri honum. Og tað ivist eg í, um føroyski áskoðarin ger. Til tað er frástøðan millum vanlig fólk og føroyskar politikarar ov lítil. Til tað er tað ivasamt, um føroyskir politikarar tykjast fólki nóg gátuførir.

Hinvegin trúgvi eg, at tað kom óvart á áskoðaran at síggja, hvussu illa tvey politisk floksapparat virka. Her var upptøkutólið stillisliga náðileyst í mátanum tað avdúkaði, at stórur partur av politisku strategiini var latin til tilvildina, at ikki ein tann einasti professionelli ráðgevin ella spindoktarin var uppi í politiska leikinum - heldur ikki til allarseinast, har tað í staðin var kona løgmann, Anita, í kom við góðum ráðum.

